FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 2. mars 2020
J. nr.: 20/00075-2

Svar uppá spurning nr. 56/2019 eftir § 52a í tingskipanini

Spurningur frá Brandi Sandoy, løgtingsmanni, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um ójavna prísáseting hjá Landsverki.

Spurningurin er soljóðandi:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at bera so í bandi, at søluprísurin av skervi verður tann sami á Sandoynni sum aðrastaðni í landinum?

Svar:
Sum upplýst verður í viðmerkingunum til spurningin, framleiðir Landsverk ikki longur skerv í Sandoynni. Landsverk upplýsir, at stovnurin frá 1978 til 2018 rak grótbrot við Krókafoss á Sandi, men at alsamt broyttar fyritreytir á stovninum hava gjørt tað neyðugt at tillaga framleiðslu og veiting av skervi og gróti. Í 2018 yvirtók tunnilsfelagið grótbrotið frá Landsverki.

Hóast Landsverk sostatt ikki longur hevur framleiðslu í Sandoynni ber tó framvegis til at fáa hendur á skervi í oynni, tí Landsverk flytur skerv frá framleiðslueindunum á goymslu í Skopun. Flutningurin fer fram við skipi, og Landsverk upplýsir, at hóast annar kostnaður er knýttur at flutninginum, er tað bert kostnaðurin fyri sjálvan skipsflutningin, ið verður lagdur oman á prísin. Aðrar útreiðslur, so sum lastvognakoyring, umskiping og vøru- og havnagjøld, stendur Landsverk fyri.

Landsverk upplýsir í hesum sambandi, at júst viðvíkjandi knúsing og veiting av skervi, er ikki heilt rætt at síggja Landsverk sum ein almennan stovn. Orsøkin er, at henda framleiðsla er partur av inntøkufíggjaða virkseminum, sum skal hvíla í sær sjálvum. Landsverk upplýsir, at allar útreiðslur, ið standast av hesum virksemi, skulu fíggjast við søla av asfalti, skervi ella gróti, og at henda tænasta ikki kemur undir alment virksemi.

Samanumtikið er støðan í dag soleiðis, at somu prísir eru galdandi við heinting av tilfari frá øllum framleiðslueindum, men at partur av flutningskostnaðinum verður lagdur oman á prísin, um Landsverk flytir tilfar á eina økisgoymslu nærri kundanum.

Í løtuni er støða ikki tikin til, um ætlanin er at broyta hesa skipan.

Tinganes, 2. mars 2020

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum